
Torgrim Reitan, fíggjarstjóri í Statoil. Mynd: Trond Iskasen/Statoil

# Mugu ansa eftir at tunglyndi ikki rakar oljuvinnuna

**Jógvan Hugo Gardar**

20.09.2014 - 14:07

Oljan.fo

Vit trýsta ikki á nakra bremsu, men vit trýsta ikki so hart á speedaran, sigur fíggjarstjórin í Statoil, Torgrim Reitan, í samband við tær nógvu uppsøgnirnar í oljuídnaðinum.

Hann ávarðar móti at vinnan endar í tunglyndi. Í eini samrøðu við Aftenposten sigur hann at Statoil ikki trýstir á bremsuna. Teir bara tilpassa støðuna, og tað kann fyri nøkur vera ein nokso ræðandi støða.

- Men vit gera framvegis stórar íløgur í oljuvinnuna, og tað koma at verða gjørdar stórar íløgur í vinnuna framyvir, sigur hann, samstundis sum hann viðurkennir at verandi støða rakar meint tey sum missa arbeiði.

Støðan er í løtuni krevjandi hjá oljuvinnuni um allan heim. Sambært Reitan er talan um møguleikan at tjena pengar, og at nógv oljufeløg eru noydd til at gera nakað við raksturin, har ov stórar íløgur og krevjandi ætlanir gera at tey noyðast at spara.